Dómarin í Fútarættinum:

# Nýtti aðra sak sum grundgeving

FØÐIDEILDIN
Eydna Skaale
Eydna@sosialurin.fo

Sosialurin hevur roynt at fáa hendur á úrskurðinum í málinum, men dómarin, Peter Flügger, sigur við Sosialin, at úrskurðurin framvegis ikki var liðugt skrivaður, tá blaðið fór til prent.

Peter Flügger vildi ikki geva eina munnliga frágreiðing um málið, men segði, at partarnir fáa úrskurðin kl 13 fríggjadagin, eftir at Sosialurin erfarin til prentingar, og hann væntaði ikki at vera liðugur at skriva úrskurðin fyrr enn tá.

Hóast hann var ógvuliga fámæltur, so segði hann tó, at hann serliga hevur nýtt eina aðra sak sum grundgeving fyri dóminum. Talan er um sakina ímillum Fiskimálastýrið og Føroya Skipara– og Navigatørfelag, sum varð avgjørd 17. mars 2005.

# Málið er ikki avgjørt

**Málið ímillum Fiskimálastýrið og Skipara- og Navigatørfelagið, sum úrskurðurin um stríðið á føðideildini er bygdur á, hevur higartil fingið tríggjar avgerðir í trimum ymiskum rættum. Nú bíða partarnir eftir at sleppa í hægsta rætt**

FØÐIDEILDIN
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo



*Verkfallsmálið um Brimil ímillum Fiskimálastýrið og Skipara- og Navigatørfelagið, varð lagt sum grund fyri dóminum frá fútarættinum. – Tað er burturvið at fútarætturin skal uppí málið, heldur Ellintur Abrahamsen*

Ellintur Abrahamsen, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelagi, sigur, at málið, sum úrskurðurin hjá sjúkrarøktarfrøðingunum er bygdur á, er málið sum var í sambandi við, at Skipara- og Navigatørfelagið ikki fekk ein sáttmála fyri Brimil í síni tíð.

Tað endaði við verkfallið. Ellintur greiðir frá, at fimm av limum felagsins eisini vóru arbeiðsleysir tá. So hendi tað, at Tjaldrið ein dag ikki hevði nakran stýrimann. Skipara- og Navigatørfelagið noktaði limum sínum at søkja arbeiðið, fyriuttan teimum fimm arbeiðsleysu monnunum.

Fyrstu ferð tað var gjørt hendi einki. Men aðruferð felagið noktaði limum sínum at søkja, fyrr enn málið um Brimil var komið í rættlag, varð tað drigið í fútarættin, sum noyddi limirnar aftur til arbeiðis.

– Teir fóru so til arbeiðis, og tað var ikki meiri at gera við tað málið. Men seinni kom málið inn fyri Føroya rætt. Og teir góvu okkum fult viðhald. Vit høvdu allan rætt til at fara í verkfall og at nokta limum okkara at søkja arbeiðið, staðfestir Ellintur Abrahamsen.

Hann sigur tó, at málið enn einaferð varð skotið inn fyri rættin, hesuferð Eystara landsrætt.

– Teir søgdu, at vit høvdu ikki loyvi at nokta limunum at søkja arbeiðið, tí verkfallið var ólógligt. Og tað dugdu vit væl at síggja, at um verkfallið var ólógligt, so var fylgjandi forboð tað eisini, greiðir Ellintur frá.

Men framvegis er málið ikki avgreitt. Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur søkt um at fáa eina avgerð frá hægsta rætti.

– Vit hava framvegis ikki fingið nakað svar, men eg havi skilt á lagnum, at tað fer at lata seg gera. So vit bíða eftir endaligu avgerðini, sigur Ellintur Abrahamsen at enda.

### Púra burturvið

Skipara- og Navigatørfelagið er eitt av teimum 16 yrkisfeløgunum, sum hava skrivað undir yvirlýsingina, sum sæst aðrastaðni á síðuni.

– Vit eru ímóti, at fútarætturin verður drigin inn í mál, sum snúgva seg um føroyska arbeiðsmarknaðin. Serliga tí, at málini so verða avgjørd eftir lógum, ið eru galdandi fyri danska arbeiðsmarknaðin. Og tær lógirnar eru ikki galdandi í Føroyum, vísir Ellintur Abrahamsen á.

Hann sigur víðari, at málini eisini verða avgjørd av fólki, sum vita alt um danska arbeiðsmarknaðin, men einki um tann føroyska. Tí eru tey ikki før fyri at koma við einum nøktandi dómi.

– Vit eru ímóti, at danskar reglugerðir, sum ikki eru galdandi her á landi, skulu avgerða mál her á landi, sigur Ellintur.

Spurdur hvat so átti at verið gjørt í stríðnum um føðideildina og við ólógliga verkfallið, svarar Ellintur Abrahamsen, at partarnir áttu at funnið eina semju sínamillum.

– Partarnir áttu at tosað saman. Tað kann vera, at tað eru nakrir trupulleikar, men veruligu trupulleikarnir koma ikki fyrr enn partarnir gevast at tosa saman. Og um tað ikki letur seg gera, so vilja vit undir øllum umstøðum mótmæla, at málið verður flutt í fútarættin, sigur hann.

Ellintur Abrahamsen skoytir tó uppí, at hetta er eitt stríð ímillum tvey fakfeløg og leiðsluna á sjúkrahúsinum. Og at hendan ósemjan hevur verið leingi á veg.

– Eg haldi, at fakfeløgini ikki hava dugað nóg væl at finna loysnir. Málið hevur tikið langa tíð, uttan at nakað ítøkiligt er hent. Tað er skyldan hjá fakfeløgunum at finna góðar loysnir, og tað haldi eg ikki, at tey hava gjørt í hesum førinum, slær Ellintur Abrahamsen at enda fast.

Nýggj uppfinning - sjálvvirkandi línudragari:

# Tekur fiskin upp í einum »elevatori«

**Ein norsk uppfinning tekur nú arbeiði úr hondini á manninum, sum vanliga stóð við línurulluna umborð á einum línubáti. Sjálvvirkandi línudragarin, sum Delitek í Noregi hevur uppfunnið, syrgir fyri, at fiskurin, sum áður var goggaður við lúnningina, nú kemur upp í »elevatori«**



*– Við hesi skipan, sum er rættiliga nýggj á marknaðinum, verður fiskurin – tá ið hann kemur upp í vatnskorpuna, førdur inn í ein sonevndan »elevator«. Fyrst fer hann upp í avkrøkjaran og síðan í bandskipanina, sum síðan lyftir fiskin upp í blóðgingarpavnin á dekkinum. Hetta merkir, at fiskurin verður ongantíð goggaður, sigur Theodor Poulsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

NAFF
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Á eini so stórari fiskivinnuframsýning, sum North Atlantic Fish Fair, er nógv at síggja, og hjá tær sum tíðindamanni er ikki lætt at velja burtur úr, hvar tú best kanst brúka tína orku teir dagarnar, stevnan varir. At vitja einar 250 framsýnarar, har fleiri enn 300 einstakir framsýnarar eru á básunum, er næstan ógjørligt. Tú kanst steðga á og spyrja teg fyri, men tað er ógjørligt at fregnast um alt, teir hava á sínum básum. Hvør framsýnari er á sín hátt áhugaverdur, og tú verður snøgt sagt »bumbaður« við informatión.

### Nýggj uppfinning

Á felags básinum hjá Nes kommunu hittu vit Theodor Poulsen, sum eigur trolbát og hevur siglt meginpartin av sínum lívi. Hann og konan, Katrin, hava eitt firma, tey rópa TheoKat. Tey umboða ymiskt forvitnisligt, sum tey hava fingið hendur á, eitt nú í Noregi. Eitt av hesum umboðum er ein sjálvvirkandi línudragari, har fiskurin ikki longur verður goggaður við lúnningina.

– Við hesi skipan, sum er rættiliga nýggj á marknaðinum, verður fiskurin – tá ið hann kemur upp í vatnskorpuna, førdur inn í ein sonevndan »elevator«. Fyrst fer hann upp í avkrøkjaran og síðan í bandskipanina, sum síðan lyftir fiskin upp í blóðgingarpavnin á dekkinum. Hetta merkir, at fiskurin verður ongantíð goggaður, sum vanligt er umborð á útróðrarbátum og línubátum. Dettur fiskur av húkinum eftir, at hann er komin inn í »elevatorin«, fer hann ikki í havið aftur.

Theodor Poulsen sigur, at tað er norska fyritøkan, Delitek, sum hevur uppfunnið og frameitt hesa skipan, og tekniskur stovnur í Tromsø í Noregi hevur verið við í menningini av henni.

– Skipanin er roynd umborð á útróðrarbátum, og so hvørt sum hesar royndir eru gjørdar, er hon eisini betrað, soleiðis at hon í dag virkar sum ætlað.

Hann sigur, at hetta er ein skipan, sum »avloysir« mannin við rulluna.

### Útróðrarbátar og línuskip

– Í fyrsta lagi er skipanin bygd til útróðrarbátar, men nú verður hon so eisini bygd til størri línuskip, har hon verður »feld« inn í skipssíðuna.

Theodur sigur, at tá ið elevator-skipanin, sum annars hongur føst í lúnningini, ikki er í brúki, verður hon tikin inn við eini oljutrýstskipan og løgd oman á blóðginhgarpavnin, til drigið verður aftur.

– Eitt av endamálunum við hesi skipan er, at fiskurin ikki verður goggaður, og tískil verður dygdin á honum eisini betur. Verður tað einaferð soleiðis, at fiskur verður førdur livandi til lands í brunnbáti, er hetta ein útmerkað uppfinning. Hinvegin kann maðurin, sum vanliga stóð við rulluna, nú í størri mun taka sær av blóðging og kryvjing – og annars ansa eftir, at línan, sum drigin verður, kemur inn, sum hon skal, sigur Theodor Poulsen.



*– Maðurin, sum vanliga stóð við rulluna, kann nú í størri mun taka sær av blóðging og kryvjing – og annars ansa eftir, at línan, sum drigin verður, kemur inn, sum hon skal, sigur Theodor Poulsen*